

# Søkt verður eftir starvsfólki til bókhaldið

Arbeiði er fjølbroytt og mennandi. Starvið fevnir um allar tættir innan bókhald.

Talan er um eitt starv, har tú fært høvi til at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, sum er í einari støðugari broyting, saman við dugnaligum og góðum starvsfeløgum.

**Førleiki**
Avgerandi er, at tú hevur áhuga í fyrisitingarligum viðurskiftum og royndir innan bókhald. Tað er umráðandi at viðkomandi er fyrikomandi og hevur hegni og hug at hjálpa til, har tað er neyðugt, tá á stendur.

Vit vænta at tú hevur lokið handilsskúlaprógv ella hevur royndir, ið eru samsvarandi við hesari útbúgving.

**Starvstreytir**
Løn, arbeiðstíð og onnur starvsviðurskifti eru eftir nærri avtalu við arbeiðsgevaran.

**Umsókn**
Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at ringja til Esmar Olsen, fíggjarleiðara á telefon 344071. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til eo@formula.fo ella við brævi til

Formula.fo
Att. Esmar Olsen
Stiðjagøta 5
Postsmoga 1078
FO-110 Tórshavn

Vit vóna at rætti umsøkjarin kann byrja í starvinum umleið 1. september 2006. Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 15 juli 2006.

**Formula.fo**

Formula.fo er privat KT-fyritøka við 70 fólkum í starvi, ið útvegar vørur og tænastu innanlendis og uttanlendis. Í fyrisitingini arbeiða í dag á Formula.fo 5 starvsfólk.

www.sansir.fo

P/F Formula.fo, Stiðjagøta 5-11, Postrúm 1078, 110 Tórshavn, Tel 344000, Fax 344001, www.formula.fo

formula.fo




# LÆRLINGUR

## TIL FYRISITINGINA Í TÓRSHAVN SÓKNAST VIT EFTIR EINUM DUGNALIGUM OG ELDHUGAÐUM LÆRLINGI

**Vit bjóða**
eina útbúgving í eini framkomnari fyritøku, har vit við at seta tænastu og góðsku í hásæti virka í einum spennandi og vaksandi virkisøki innan handil og byggitilfar.

Í løtuni arbeiða 6 starvsfólk í fyrisitingini, men vit hava brúk fyri tær afturat. Ynskiligt er, at tú kanst byrja 1. august. Tú kemur sum lærlingur at virka í einum vælvirkandi toymi av starvsfólki, sum seta tænastuna og gott arbeiðsumhvørvi í hásæti.

**Lærutíðin**
er 3 ár, um umsøkjarin hevur lokið FHS-prógv, og 2 ár um HH-útbúgving er lokin.

**Starvið**
inniber, at tú sum frálíður fært ábyrgd av ávísum økjum hoyrandi til deildina. Við tøttum samstarvi við hinar deildirnar eru høvuðsuppgávurnar hjá deildini hesar:

- Telefon- og kundaavgreiðsla v.m.
- Skráseting av innkeypi
- Bókhald
- annað fyrifallandi, so sum postur v.m.

**Vit vænta**
at tú ert málsøkin, setur kundatænastu í fremstu røð og hevur evni og viljan at verða ein virkin luttakari millum nakrar sera royndar og dugnaligar starvsfelagar.

**Tú fært**
eitt spennandi læruupláss, har tú kanst menna tíni evni innan fyrisitingarligar uppgávur á einum stórum og virknum arbeiðsplássi. Løn og setanartreytir verða sambært avtalu.

Umsóknarfreistin
er týsdagin tann 27. juni 2006, og skulu umsóknir sendast til:

**Timburhandilin**
Heykavegur 4
Boks 3038
110 Tórshavn
Att.: Eydna Hvalsrætt, fyrisitingarleiðari
Email: eh@timburhandilin.fo

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN